# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fyrsti skrivstovunæmingur á kommunuskrivstovuni

**Esther Suðuroy var avlærd í skrivstovuyrkinum tann 14. apríl og er fyrsti skrivstovunæmingur á kommunuskrivstovuni í Vági**

ÚTBÚGVING

14. apríl 2005 var ikki sørt søguligur dagur, hildu tey á kommunuskrivstovui í Vági, og var tí eitt sindur gjørt burturúr, tá fyrsti skrivstovunæmingurin har var avlærdur.

Esther Suðuroy hevur lokið prógv í skrivstovuyrkinum innan fyrisiting.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, kundi handa Esther lærubræv, tá avvarðandi, umsiting, og býráð savnaðust til lítla hugnaløtu í samband við dagin.



*Kirstin Strøm Bech (h.m.) handar Esther Suðuroy lærubræv á lítlari hugnaløtu á býráðsskrivstovuni í Vági hósdagin*

## Ragna og Elsba keypt klædnahandilin Seytjan

Møðgurnar Ragna og Elsba Jacobsen í Havn hava keypt klædnahandilin Seytjan við Áarvegin frá Nitu Sørensen, ið hevur átt og rikið handilin.

Handilin er settur í stand og letur upp leygardagin 30. apríl kl. 9.00. Navnið verður framvegis Seytjan, og klædnamerkini vera tey somu saman við nøkrum nýggjum merkjum. Eisini vera klæðir í stórum støddum at fáa.




*Leygardagin 30. apríl letur klædnahandilin Seytjan upp við nýggjum eigarum*

## Framsýning í Ribarhúsi



TÍÐINDASKRIV

Fuglafjarðar Kvøldskúli hevur framsýning av kvøldskúlaarbeiði í handverk/list í Ribarhúsi í Fuglafirði frá dýrabiðjudegi 22. apríl til og við flaggdagin 25. apríl, allar dagar kl. 15-20.

**Dagurin**
**20. apríl. Sulpicius**, deyður umleið 1115. Háborin rómverji, sum saman við einum øðrum, Serilianusi, gjørdist kristin; teir vórðu hálshøgdir.

## Kvørkveggja á postkassanum





*Postmaðurin helt fyri, at hendan forrætt hava tey, sum bert hava postboks ella e-post, ikki.* Mynd. Jens Kristian Vang

Tá postmaðurin seinasta mánadag skuldi koyra brøv í ein postkassa í Hamarsgøtu í Havn, varð hann heldur skakkur, tá ein kvørkveggja fleyg av reiðrinum, hon hevði gjørt omaná postkassanun í vikuskiftinum. Tað vísti seg, at í reiðrinum vóru fýra egg.

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu og hjálptu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Jútta S. Jacobsen**
**á Bakka, Glyvrar**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Meinhard Bjartalíð, prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravara.

Tøkk til Jensinu og genturnar fyri vakurt spæl. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur. Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jóhanna, Hans, Róland, Halgerð og Martin**